


www.oljan.fo

**Jan Müller** 19 - 01 - 2013

# Oljan rennur nú aftur á Brentleiðini

Oljan rennur nú aftur í Brent rørleiðingini í bretska partinum av Norðsjónum, eftir at 27 oljukeldur eystan fyri Hetland vórðu stongdar mánadagin orsakað av einum leka innan í einum av beinunum á Cormorant Alfa pallinum 100 fjórðingar úr Hetlandi. Pallurin er umleið 100 fjórðingar í ein landnyrðing úr Hetlandi. Oljan, sum rennur gjøgnum Brent rørleiðinga til Bretlands, stendur fyri 10% av samlaðu bretsku oljuframleiðsluni. Tí var rættiligt órógv hjá myndugleikunum serstakliga í Skotlandi, tá framleiðslan varð steðgað. Sum skilst er eingin olja likin í havið og hava serfrøðingar nú funnið brekið og rættað tað. Tað renna umleið 90.000 tunnur av olju um dagin gjøgnum henda partin av Brent-leiðingini.